# VIÐTØKUR

## fyri

## P/F Norðoya Íløgufelag

### Navn felagsins, heimstaður og endamál

**§ 1**

Navn felagsins er P/F Norðoya Íløgufelag, og heimstaður tess er í Klaksvík.

**§ 2**

Endamál felagsins er at eiga partabrøv og onnur virðisbrøv, útlán, handil og annað starv í hesum sambandi.

### Partapeningur og partabrøv

**§ 3**

Partapeningurin er kr. 5.500.000 býttur í partabrøv áljóðandi kr. 1.000,00, ella margfald av hesi upphædd.

Partabrøvini skulu ljóða uppá navn og vera skrivað inn í partabrævabók felagsins.

Partabrøvini skulu ikki vera umfaraskjøl.

Við avhending av partapeningi er tann regla galdandi, at verandi partaeigarar hava forkeypsrætt í tí lutfalli, sum teir eiga partapening í felagnum. Tilboð um forkeypsrætt verður sent umvegis nevnd felagsins, sum hevur skyldu til innan eina viku at víðarisenda tilboð til allar partaeigarar. Hesir skulu so innan tríggjar vikur frá móttøkuni av tilboðnum gera forkeypsrættin galdandi.

Keypspeningurin fyri partapeningin verður ásettur til tað virðið 3. persónur hevur bjóðað við próvfastari fígging. Fyriliggur einki próvfast boð frá 3. persóni, verður keypspeningurin ásettur til virðið av partapeninginum samsvarandi innara virðinum, uppgjørt av grannskoðara felagsins við støði í fíggjarligu støðu felagsins og roknskapum felagsins seinastu árini, umframt eini meting av frramtíðarvánunum við tí endamáli at áseta handilsvirðið.

Ynskja ein ella fleiri partaeigarar ikki at yvirtaka ein til teirra partapening svarandi part av tí bjóðaða partapeninginum, hava hinir partaeigarar á sama hátt forkeypsrætt til hesi í tí lutfalli teir eiga partapening. Teir skulu gera forkeypsrættin galdandi seinast 4 vikur eftir at teir hava fingið boð um sekundera forkeypsrættin.

Tann parturin av útbjóðaða partapeninginum, sum ikki ynskist yvirtikin av hinum partaeigarunum eftir frammanfyri standandi reglum, kann frítt avhendast til aðra síðu, tó ikki til lægri kurs, ella lagaligari treytir enn bjóða varð partaeigarunum sum avgjørt frammanfyri og treytað av, at selt verður seinast tveir mánaðir eftir at seljarin hevur fingið boð um at forkeypsrætturin ikki verður gjørdur galdandi. Í føri har bjóðað verður til lægri kurs, ella lagaligari treytir, skulu partaeigararnir av nýggjum hava forkeypsrætt til partapeningin í sama lutfalli og á sama hátt sum ásett frammanfyri.

Forkeypsrætturin er tó ikki galdandi um partapeningur verður avhendur millum feløg í somu koncern, ella feløg, har partaeigararnir eru nærstandandi.

**Mortifikatión**

**§ 4**

Partabrøv felagsins kunnu mortifiserast uttan dóm eftir reglunum, sum til eina og hvørja tíð eru galdandi fyri skjøl, sum ikki eru umfaraskjøl.

## Aðalfundir

§ 5

Nevndin boðar við freist uppá í minsta lagi 8 dagar og í mesta lagi 4 vikur frammanundan hvørjum einstøkum partaeigara til fundar við brævi til tann bústað, hann hevur latið skrivað í partabrævabókina. Brævið skal innihalda fundarskrá við tilskilan av fundarstaði og tíð. Verða uppskot at viðgera, ið til samtyktar krevja serligan meiriluta, skal hetta verða tilskilað í fundarboðunum.

§ 6

**Á ársaðalfundi skulu fundarevnini vera hesi:**

a) Val av fundarstjóra.
b) Frásøgn nevndarinnar frá virki felagsins í farna ári.
c) Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi og ársfrágreiðing til góðkenningar.
d) Avgerð um nýtslu av yvirskoti, ella rindan av halli sambært góðkenda roknskapin.
e) Val av nevndarlimum.
f) Val av grannskoðara.
g) Uppskot frá nevnd ella partaeigarum, um nakað er.

## Atkvøðurættur v.m.

§ 7

Hvør partaeigari eigur eina atkvøðu fyri hvørjar kr. 1.000,00, hann eigur í partapeningi.

## Nevnd og stjórn

**§ 8**

Felagið verður stýrt av einari á aðalfundi valdari nevnd, ið hevur millu 3 og 5 limir.

Nevndarlimir verða valdir fyri eitt ár í senn. Afturval kann fara fram.

**§ 9**

Nevndin, ið sjálv velur formann sín, hevur hægstu leiðsluna av viðurskiftum felagsins. Nevndin ásetir við starvsskipan greiniligari reglur fyri starvi sínum.

Standa atkvøðugreiðslur í nevndini á jøvnum, er atkvøða formansins avgerandi.

**§ 10**

Nevndin setir ein ella fleiri stjórar at stjórna dagligu leiðslu felagsins.

## Tekningareglur

**§ 11**

Felagið verður teknað av stjóra saman við einum nevndarlimi, ella tveimum nevndarlimum.

## Roknskapargrannskoðan

**§ 12**

Á hvørjum ársaðalfundi verður ein roknskapargrannskoðari valdur. Starv hansara stendur við, til aðalfundur hevur valt nýggjan grannskoðara.

**Roknskaparár**

**§ 13**

Roknskaparár felagsins er álmanakkaárið.

Soleiðis samtykt á stovnandi aðalfundi í Klaksvík, tann 23. februar 2006, broytt á eykaaðalfundi tann 31.12.2008, tá ið partapenginur varð hækkaður, umframt á eykaaðalfundi tann 19. januar 2009, tá ið endamál felagsins varð broytt.

Niels Winther Poulsen, adv.